**Heðin Mortensen**
**løgtingsmaður**

**Nr. 53/2019**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um farloyvi til kommunustýrislimir, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Í svari til § 52 a fyrispurning (49/2019) vísir landsstýrismaðurin til donsku kommunulógina sum grundgeving fyri, at lógartulking og siðvenjan í Føroyum um at kommunustýrislimur ikki kann taka sæti aftur áðrenn samfullar 14 dagar skal broytast. Veit landsstýrismaðurin, at í donsku lógini er skeiðið minst ein mánaða, og leggur landsstýrismaðurin ongan týdning í, at hesar orðingar eru valdar frá, tá man í 2000 skrivaði føroysku kommunulógina við neyvum íblástri frá donsku lógini?
2. Hvør er prinsipielli munurin á ásetingini og viðmerkingunum til ásetingina í § 18 í kommunustýrislógini um at kunnu fara úr starvi sínum í í minsta lagi 14 samfullar dagar, og ásetingini í Tingskipanini § 63 um farloyvi í í minsta lagi 7 dagar?
3. Hvussu kann landsstýrismaðurin tryggja, at kommunustýrislimur ikki brúkar hesa broyttu tulkingina til at sleppa sær undan borgaraskyldu síni at taka støðu í málum, sum eru løgd kommunustýrinum at taka avgerð um?
4. Ætlar landsstýrismaðurin at broyta kommunustýrislógina, so hon samsvarar við nú broyttu siðvenjuna og ásetingina í donsku kommunulógini, so at eingin ivi er um tulkingina frameftir?

**Viðmerkingar:**

Hetta er eitt heilt óvanliga prinsipielt mál, sum reisir tveir sera grundleggjandi spurningar um fólkaræði.
Annar spurningurin er, undir hvørjum umstøðum umsitingin bara soleiðis kann velja at kúvenda frá eini fastari, gamlari og rótfestari lógartulking og siðvenju á einum øki við at vísa til eina danska lóg, sum man neyvt hevur brúkt sum íbástur, og við tí tilvitað hevur valt til og frá úr.

Hin spurningurin er, hvussu vit skulu meta um starvið sum kommunustýrislimur. Um tað er eitt álitisstarv og eitt borgarligt umboð, sum hvør einstakur býráðslimur hevur fingið, og hevur skyldu til at røkja eftir bestu sannføring, ella um tað ein framíhjárættur, sum hvør einstakur kommunustýrislimur kann velja at røkja ella ikki at røkja, soleiðis sum hann ella hon finnur fyri gott.

**Á Løgtingi, 12. februar 2020**

Heðin Mortensen